HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
Túrur nr. 1930 Heystyvirlitstrolingar (fyrri túrur), tíðarskeið: 31/07 til 14/08 – 2019

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Jákup Pæturson Dam, Jens Arni Thomassen, Regin Kristiansen, Sigvald Kristiansen og Hannipoula Olsen.

**Ábyrgd:** Hannipoula Olsen, ið var kanningarleiðari og túrleiðari.

**Endamál:** At fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu fiskasløgum. Tal, vekt og longdarbýti vórðu skrásett fyri øll fiskasløg í veiðuni og magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa. Í samband við sýnistøku til samstarvsgransking uttanhýsis kann viðmerkjast at vit tóku 9 DNA-sýni og 35 nytrusýni av kjaftsvarta kongafiski, og 1 DNA og 1 nytrusýni av lýsingi. Harafturat tóku vit 14 DNA-sýni av skøtu, *Dipturus batis*, saman við mynd av eygunum av tilsvarandi skøtum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham-lemmar. Breitlar 60 m (grunnar støðir) og 120 m (djúpar støðir). Miniloggarar at máta sjóvarhita á trolinum.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hóskvøldið 1. august kl. 20. Vit byrjaðu á Sandoyarbankanum og tóku støðirnar eystanfyri fyrst. Leygardagin varð leiðin løgd innundir land at taka støðir útfyri Sandoynni og Nólsoynni, men harður streymur gjørdi, at vit ístaðin fóru norðurum at taka støðir. Vit komu inn á Toftir týsdagin 6. august at landa, samstundis sum arbeitt varð upp á aðra telduskipanina til sýnistøku. Løgdu síðani leiðina eysturum aftur at taka írestandi støðir á Fugloyartunguni. Seint fríggjakvøldið vóru aftur trupulleikar við telduskipanini. Vit umløgdu sýnistøkuna til at koyra við einari telduskipan gjøgnum náttina, samstundis sum vit tóku støðir inn móti landið. Leygarmorgunin komu vit inn á Fuglafjørð og bleiv ein onnur telduskipanin riggað til. Hareftir tóku vit írestandi støðir á Mýlingsgrunninum, og fór so vestur um Mykines at taka uttastu støðirnar í góðveðrinum mánadagin. Vóru aftur á Havnini mikumorgunin kl. 07. Veðrið var gott meginpartin av túrinum, við eitt sindur av aldu tað seinna vikuskiftið. Tilsamans vóru 135 hál tikin, har av 129 góðkend. Tískil vóru 71 støðir eftir at taka á seinna yvirlitstúrinum, tá hann byrjaði 15. august.

**Prøvatøkan:** Veiðan varð viðgjørd sambært túrætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar eru víst í talvu 1 (GG. Hesi tøl umboða bert túr 1930, og ikki alla yvirlitstrolingina í heyst). Vit fingu 3 merktir toskar.

**Nær er ynskiligt at sýnini eru upparbeidd:** Túrurin varð liðugt rættaður 6. septembur. Ynskiligt er, at allar nytrurnar skulu vera lisnar og førdar inn í databasuna í seinasta lagi 15. oktobur 2019.

**Fyribilsúrlit fyri túr 1930:**
Skrásett vóru íalt 42 fiskasløg á teimum 129 hálunum. 2566 fiskar vóru nytraðir til aldurslesing á landi, og 392 magar vóru kannaðir. Fiskurin var sum heild illa fyri við lágum konditiónsfaktori, harumframt var nærum ongin nebbasild at finna í magunum.

Hannipoula Olsen,
Havstovan 6/9 – 2019

**Talva 1 – Yvirlit yvir veiðu (kg), nytrur og magar, tikin á túri 1930 í tilsamans 129 hálum.**

| FISKASLAG | KG | NYTRUR | MAGAR |
|---|---|---|---|
| HÝSA | 43115.700 | 813 | 128 |
| UPSI | 14051.210 | 783 | 108 |
| TOSKUR | 5454.982 | 813 | 154 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 4943.833 | | |
| HVITINGUR | 4682.816 | | |
| LONGA | 3438.989 | 109 | 1 |
| SVARTKJAFTUR | 3183.263 | 5 | |
| HVITINGSBRODIR | 2571.991 | | |
| GULLLAKSUR | 1913.699 | | |
| TUNGA | 1339.652 | | |
| BLÁLONGA | 1098.509 | 10 | 1 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 920.886 | | |
| REYÐSPRØKA | 794.428 | | |
| HAVTASKA | 646.881 | | |
| BROSMA | 451.680 | 42 | |
| PORIFERA | 337.301 | | |
| SANDSPRØKA | 294.106 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 282.905 | | |
| MAKRELUR | 184.769 | | |
| SKØTA(BATIS) | 180.816 | | |
| HAVMÚS | 171.232 | | |
| KALVI | 165.325 | | |
| SVARTKALVI | 145.808 | | |
| TINDASKØTA | 100.640 | | |
| SILD | 93.567 | | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 93.272 | | |
| LÝRUR | 91.920 | | |
| SILVUR MURTUR | 82.131 | | |
| IGULKER | 60.225 | | |
| HALAHVASSA SKØTA | 57.605 | | |
| KNURRHANI | 57.314 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 47.647 | | |
| LÍTLA BROSMA | 43.298 | | |
| LOLIGO | 39.054 | | |
| HVALSPÝGGJ | 21.324 | | |
| HOLOTHUROIDEA | 19.684 | | |
| HVASSASPREK | 19.253 | | |
| LÁLLA | 18.882 | | |
| STEINBITUR | 18.675 | | |
| PARAGORGIA ARBOREA | 17.563 | | |
| LYCODES ENDIPLEURISTCTUS | 12.724 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 11.429 | | |
| PURPURIGULKER | 9.216 | | |
| JÁKUPSSKEL | 8.730 | | |
| LÝSINGUR | 7.945 | | |
| PHAKELLIA SP | 7.078 | | |
| KLINGRUSKØTA | 6.362 | | |
| LIRI | 6.040 | | |
| MEDUSAHØVD | 5.821 | | |
| STREYMSILD | 3.745 | | |
| ASTERIIDAE | 3.620 | | |
| GÁGGA | 2.710 | | |
| ØÐA | 1.786 | | |
| KRÝTTLINGUR | 1.512 | | |

| | |
|---|---|
| TRØLLAKRABBI | 1.120 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0.849 |
| KRØKILSKRUTT | 0.784 |
| ØDA (DEYÐ) | 0.645 |
| ACTINIARIA | 0.391 |
| BIVALVIA (DEYÐ) | 0.366 |
| JAKUPSSKEL (DEYÐ) | 0.146 |
| LOPHELIA PERTUSA | 0.126 |
| RÆKJA | 0.012 |
| TRØLLAHUMMARI | 0.011 |
| Tilsamans | 91412.350 |